**Formuladeildin**

| | D | v | j | t | mál | +/1 | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. NSÍ | 25 | 18 | 3 | 4 | 47-21 | 26 | 57 |
| 2. B36 | 25 | 14 | 7 | 3 | 45-17 | 28 | 52 |
| 3. EB/S | 25 | 15 | 3 | 7 | 50-30 | 20 | 48 |
| 4. HB | 25 | 14 | 3 | 8 | 54-35 | 21 | 45 |
| 5. GÍ | 25 | 9 | 5 | 11 | 37-51 | -14 | 32 |
| 6. Skála | 25 | 9 | 4 | 12 | 25-35 | -10 | 31 |
| 7. KÍ | 25 | 9 | 4 | 12 | 41-44 | -3 | 31 |
| 8. B71 | 25 | 8 | 5 | 12 | 37-45 | -8 | 29 |
| 9. AB | 25 | 4 | 5 | 15 | 30-52 | -22 | 17 |
| 10. VB/S | 25 | 2 | 5 | 18 | 24-64 | -40 | 11 |

**1. deild menn**

| | D | v | j | t | mál | +/1 | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. B68 | 26 | 22 | 3 | 1 | 75-19 | 56 | 69 |
| 2. ÍF | 26 | 18 | 4 | 4 | 80-22 | 58 | 58 |
| 3. FSV 04 | 26 | 16 | 3 | 7 | 47-35 | 12 | 51 |
| 4. TB | 26 | 13 | 4 | 9 | 52-28 | 24 | 43 |
| 5. LÍF | 26 | 13 | 1 | 12 | 63-45 | 18 | 40 |
| 6. NSÍ | 26 | 9 | 3 | 14 | 44-63 | -19 | 30 |
| 7. HB | 26 | 9 | 2 | 15 | 36-57 | -21 | 29 |
| 8. SÍ | 26 | 8 | 3 | 15 | 35-61 | -26 | 27 |
| 9. KÍ | 26 | 5 | 2 | 19 | 27-66 | -39 | 17 |
| 10. B36 | 26 | 3 | 3 | 20 | 22-85 | -63 | 12 |

# ur dagur í Runavík

hent, at teir einki stig vinna sunnudagin. Tað valdast um úrslitið í Streymnesi.

Men hóast NSÍ verður meistari sunnudagin, so verður einki alment meistarahald fyrrenn næsta leygardag, tá ið liðið – ivaleyst við stórum stuðlafylgi – fer at koma aftur úr Klaksvík við FM steypinum og gullkrónunum.

Eitt er alment hátíðarhald og alt tað formella við steypi og gullkrónum. Annað er, at tað í Runavík verður arbeitt við, at tað væl og virðiliga skal markerast, tá ið NSÍ sunnudagin í sínum 50. ári hevur vunnið fyrsta FM heitið.

Stuðlafelagið og viðhaldsfólk yvirhøvur fara at møta væl brynjaði upp úti við Løkin seinnapartin sunnudagin, og vit skilja á lagnum, at tað fer bæði at síggjast og hoyrast, tá ið fyrsta FM heitið verður fingið inn um stokkin. Og tað verður gjørt, hóast veðurvánirnar ikki boða frá nøkrum serligum veðri sunnudagin.

VB/Sumba hevur tikið tað ógvuliga virðiliga, at liðið er flutt niður í næstbestu deildina. Tað fara teir ivaleyst eisini at gera hesa ferð.

NSÍ spælararnir skulu hava fokus á tí, sum gongur fyri seg inni á vøllinum og ikki tí, sum fer at ganga fyri seg kring vøllin. Kanska tað fer at hava við sær, at tað ikki fer at verða lagt so ógvuliga nógv í at vinna serliga nógv!

Tað var ikki gamalt, at NSÍ var serliga nógv ávirkað av, at landsliðsfótbóltur var á skránni. Eisini hetta er broytt. Tað hevur sást væl og virðiliga á venjingunum í Runavík seinastu vikurnar, at Føroyar hava spælt fleiri landsdystir. Umleið helmingurin av spælarunum hevur verið upptikin av landsliðsfótbólti.

Jens Martin Knudsen, Óli Hansen, Jóhan Troest Davidsen, Christian Høgni Jacobsen, Hjalgrím Elttør og Einar Hansen hava verið á ferð saman við a-landsliðnum. Øssur Dalbúð, Jann Martin Mortensen og Klæmint A. Olsen hava verið í Bulgaria við U19 landsliðnum, og Bogi Løkin hevur verið burturi við studentaskúlaflokkinum.

Í gjárkvøldið var alt NSÍ liðið samlað aftur við Løkin, og í kvøld fara teir at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til síðsta heimadystin í ár. Tað verður í hesum dystinum, at tað verður staðfest, at NSÍ hevur vunnið fyrsta FM heitið nakrantíð.

# Siga farvæl í Sarpugerði

**GÍ og Skála hava plaseringarnar í miðjuni at stríðast um í grannauppgerðini**

**GÍ-SKÁLA**
*Jákup Mørk*

Sunnudagin fer GÍ at spæla fyri síðstu ferð á heimavølli í ár. Tað er greitt, at felagiuð skal hava nýggjan venjara komandi ár. Tað vil siga, at uppgerðin ímóti Skála verður tann síðsta í Sarpugerði hjá GÍ við Peturi Mohr sum venjara.

Skála og GÍ stríðast um plássini frá fimm og til átta, og úrslitið hesa ferð hevur týdning í tí kappingini.

Hjá Skála hevur venjarin, John Petersen, verið upptikin av landsliðsfótbólti í smáar tvær vikur. Kristmund Johannesen, hjálparvenjarin, og formaðurin, Hans Jákup Andreassen, hava havt ábyrgdina av liðnum.

Eingin GÍ spælari hevur verið upptikin av landsliðsfótbólti. Á Skála hava Levi Hanssen, Poul N. Poulsen og Teitur R. Joensen verið upptiknir á U21 landsliðnum.

# num

EB/Streymi. Um B36 vinnur í Streymnesi hesa ferð, so hevur HB við sigri á B36 í síðsta umfarinum møguleika at ogna sær bronsumerkini. Um HB og EB/Streymur enda við sama stigatali, so verður málmunurin avgerandi. Í løtuni er málmunurin hjá HB trý mál betri, enn hann er tað hjá EB/Streymi.

Vánaliga gongdin hjá KÍ í ár sæst aftur í, at felagið eigur fáar landsliðsspælarar. Tað er bara U21 landsliðsspælarin Kristoffur Jacobsen, sum seinastu stóru vikuna hevur verið burturstaddur í altjóða fótbóltsørindum.

HB venjarin Albert Ellefsen hevur ein stóran part av tíðini, sum er brúkt upp á landsliðsfótbólt, verið í Bulgaria. Hann er annar av venjarunum hjá U19 landsliðnum. Rógvi Jacobsen, Rókur av Fløtum Jespersen og Andrew av Fløtum hava verið í Ukreina, og Poul Thomas Dam, Ólavur í Ólavsstovu og Emil Nolsøe Leifsson hava verið upptiknir av U21 landsliðsfótbólti.

# B71 miðjar hægri enn málið

**Uppflytararnir fara at skiljast sunnudagin, tá ið sandoyingar saman við áskoðarunum fara at siga farvæl við sunnudagsfótbólt á Argjum – í hvussu so er í hesum umfarinum**

**AB-B71**
*Jákup Mørk*

Sunnudagin fer AB at siga farvæl á Argjum. Argjamenn fara á heimavølli at siga farvæl við Formuladeildina og harvið sunnudagsfótbólt, og argnamenn fara at siga farvæl við B71, sum fylgdist við AB upp í bestu deildina fyri einum ári síðani.

AB venjarin seinastu mánaðirnar fer eisini at siga farvæl á Argjum sunnudagin. Meðan AB flytir niður, fer Sigfríður Clementsen at flyta norður í Sundalagið, har hann fer at hava ábyrgdina av EB/Streymi.

Nýggi AB venjarin, Allan Mørkøre, er leikbannaður hesa ferð.

Á Sandi hevur málið síðani uppflytingina í fjør verið at sloppið undan niðurflytingar plássunum. Tað hevur eydnast á tann hátt, at tað longu nú er avgjørt, at B71 undir ongum umstøðum verður niðari enn á 8. plássinum, sum sandoyingar nú eru á.

Spurningurin millum sandoyingar er, um tað kann eydnast B71 at røkka longri upp á talvuna. Tað valdast sjálvandi um úrslitini hjá liðunum, sum B71 kappast við. Um væl veit við hjá sandoyingum, so kunnu teir vinna seg fram á fimta pláss.

Hjá B71 hevur tað verið sera stórur smeitur, at toppskjúttin Clayton Soares tað mesta av tíðini síðani summarsteðgin hevur verið skaðaplágaður.

Tvær tær seinastu vikurnar hava landsliðini verið í europeiska eldinum. Tað hevur órógvað venjingarnar bæði á Argjum og á Sandi. Tríggir B71 spælarar hava verið á U21 landsliðnum, og ein hevur verið upptikin av U19 landsliðsferðini. Á Argjum hevur ein spælari verið upptikin av U21 og tríggjar av U19 landsliðnum.

B71 hevur vunnið báður ferðirnar, sum hesi bæði liðini hava dystast fyrr í ár, og í báðum førum hevur talan verið um teprar sigrar – 2-1 á Argjum og 1-0 á Sandi.

# Við – ikki við

**HB**
**Skaddur: Jákup á Borg (lærkrikin)**

**NSÍ**
**Við aftur: Hjalgrím Elttør**
**Ivasamir: Nenad Stankovic**
**Jónhard Fredriksberg**

**Skála**
**Skaddir: Pauli G. Hansen (fótskaði) og Arnold Berg (minisksk aði)**
**Ivasamur: Aleksandur Johansen**

**KÍ**
**Við aftur: Símun Joensen**
**Burturstaddur: John Hammer**
**Ivasamur: Ove Nysted**

**VB/Sumba**
**Skaddur: Henning Joensen (knæskaði)**